VB-TB 0-1 (0-0):

# Aldursforsetin hongur í

**Møguleiki røkist nú fyri, at talan verður um lokaluppgerð millum TB og VB, tá seinasti spurningurin um upp- og niðurflyting skal svarast**

2. DEILD

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*TB vann útsetta dystin í aðru deild móti VB, og er nú aftur á næst ovasta sessinum í aðru deild*
*Mynd: Áki Bertholdsen*

TB er enn felagið, sum hevur bestu kortini á hondini, tá tosað verður um møguleikan at fylgja ÍF upp í bestu deildina.

Hóskvøldið spældu tvøramenn útsetta dystin móti VB í Vági, og her eydnaðist teimum at fáa øll stigini norður aftur við sær.

Sum skilst, so var nakað av vindi, og órógvaði hetta spælið hampuliga nógv, soleiðis at talan sjáldan var um nakað væl skipað fótbóltsspæl, men tað vóru tó gestirnir, sum høvdu munin fyri tað mesta.

Leingi var tó líkt til, at talan skuldi gerast um málleysa uppgerð, men eitt lítið korter fyri leiklok eydnaðist tó einum fyrrverandi VB-leikara at skjóta avgerandi málið. TB spældi seg ígjøgnum í vinstru síðu, og tá sent varð innfyri var Olivur Abrahamsen ísakaldur og við innaru-síðuni beindi hann bóltin í málið, og so var stór frøi á TB-leikarum og – -viðhaldsfólkum.

Við sigrinum er TB nú aftur á næst ovasta plássinum í deildini, og tí kunnu teir framvegis gera av sjálvir, hvussu lagnan skal verða. Einasta liðið, sum hevur møguleika at taka teir aftur, er Sumba, men hvussu stórur hesin møguleikin er, er í løtuni nakað óvist. Fyrst og fremst tí dómsnevndin enn ikki hevur gjørt av, hvussu verður við teimum trimum stigunum, sum Sumba á skrivaraborðinum hevur vunnið frá AB, og hartil tykist eftirverandi dystarskráin hjá sumbingum nakað torførari enn hjá TB. Ikki minst tá Sumba í seinasta umfarinum skal á vitjan í Fuglafirði.

TB skal í teimum báðum seinastu dystunum splæa móti KÍ og B71, og so er spurningurin, hvussu talvan sær út, sá seinasta umfarið er leikt. Ein møguleiki er í øllum førum, at TB skal takast við besta liðið hjá VB í dystum um upp- og niðurflyting, og um tað verður støðan, so er einki at ivast í, at tað er ein uppgerð, sum fer at hava alstóran ans kring alla oynna.

EB/Streymur-VB:

# Kroystir vágbingar

**Um alt ikki skal standa og rilla í seinasta dystinum, skal VB hava stig við sær av Eiði sunnudagin**

UPPTAKT

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað stendur nógv á vágbingum fyri tíðina. Flaggskipið í fótbólti – besta mansliðið - sum vann gull fyri bara trimum árum síðani er av álvara komin í svarta økið, og nú skulu menn av álvara taka sær um reiggj, um talan ikki skal gerast um upp- og niðurflytingarstríð við annan av grannunum.

Sunnudagin fer VB á vitjan á Eiði, har heimaliðið í ár hevur staðið seg framúr væl. Einasta liðið, sum hevur fingið alt við sær av Eiði í ár, er KÍ, men skal VB ikki dettu niður um strikuna undan seinasta umfarinum, so kann gerast neyðugt at fáa trý stig sunnudagin.

Sum skilst, so eru eingir skaðar, sum hótta nakað av liðunum, men fyri VB kann tað kanska koma væl við, at EB/-Streymur longu nú hevur tryggjað sær tilveruna í deildini. Partvíst tí leikararnir hjá EB/Streymi nú bert hava æruna at stríðast fyri, og partvíst tí tað ikki kann útilokast, at Piotr Krakowski, í tann mun tað er gjørligt, letur leikarar ferðast niður til triðju deild, har EB/Streymur stríðist fyri uppflytingarmøguleikanum.

Hvussu er og ikki, so er einki at ivast í, at VB fer at stríðast av øllum alvi, og so er spurningurin, hvørt tað er nóg mikið til at mana niðurflytingarspøkilsið burtur.

FS Vágar-Skála:

# Nú má røkka ella støkka

**Vinnur Skála ikki botnuppgerðina sunnudagin er sessurin í deildini fokin**

UPPTAKT

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hóast Skála at kalla alt árið hevur átt botnsessin í fyrstu deild hjá monnum, og hóast teir fyri tað mesta hava verið roknaðir sum upplagdir dumpikandidatar, so er enn vón fyri, at liðið eisini komandi árið skal royna seg millum tey bestu.

Kravið í so máta er tó greitt. Tvær ferðir trý skulu á kontina í teimum báðum seinastu umførunum. Hvørki meira ella minni.

Sunnudagin vitjar Skála í Miðvági, har FS Vágar seinasta vikuskiftið fekk fyrsta heimasigurin á árinum til høldar, og einki er at ivast í, at heimaliðið her ætlar sær eina endurtøku. Ikki minst tí ein sigur í dystinum bæði kann gera av við beinleiðis niðurflytingarvandan, og – ikki minst – tí liðið tá møguliga kann lyfta upp um VB.

Tað er eingin loyna, at breiddin í hópinum hjá FS Vágum hevur verið til próvtøku síðani summarsteðgin, og tó at tað enn eru fleiri, sum eru burtur frá, so er kanska so spakuliga farið at líkjast aftur hjá teimum. Hvørki Kim Poulsen ella Bjarni Prior kann tó roknast við restina av árinum, men hinvegin hava onkrir »nýggir« mans tó verið til venjingar hesa vikuna. Silva hevur drigist við skaða og noyddist av vøllinum móti KÍ fyri viku síðani, men hann er so spakuliga farin at venja aftur. Tað er Jóhannis Joensen eisini, eftir at hann hevur verið úti í ein mánað. Og so hevur Eyðfinn Fjallsbak eisini verið at sæð á vøllinum fyri fyrstu ferð síðani hann skeyt tvey av málunum, tá FS Vágar í triðja umfari vann 3-2 suðuri í Vági. Spurningurin er so, hvørt venjingarstøðan hjá hesum leikarunum er nóg góð eftir drúgvu steðgirnar, men onkur broyting má so gerast, nú Elfinn Ørvarodd er leikbannaður.

### Alt at vinna

Hjá Skála eru eingi leikbann at dragast við hesaferð, men hóskvøldið var tó ivasamt, um allir leikararnir fóru at verða tøkir. Bogi Gregersen og Jonhard Frederiksberg hava báðir drigist við skaðar, men roknað verður tó við, at teir eru tøkir. Hinvegin var heldur meira ivasamt við Sveini Justinussen, sum meiddi seg í hondbóltsdysti og Paula Hansen, sum hevur havt nakað av krími.

Tað er tó einki at ivast í, at um hesir bara eru so nøkunlunda klárir, so verða teir við. Støðan er jú tann, at Skála einki hevur at missa, og við seinasta dystinum á heimavølli móti EB/Streymi, ið einki hevur at spæla fyri, so er kanska ikki heilt ógjørligt hjá liðnum at endurtaka bragdið frá í fjør, tá teir vunnu tríggjar teir seinastu landskappingardystirnar og harvið lyftu seg upp um strikuna. Fyri fyrst mugu teir tó hugsa um dystin nú sunnudagin, og so fæst at vita, hvørt dysturin annan sunnudag kann brúkast til nakað sum helst.




## Fiskivinnuroyndir 2004 – Lýsing eftir umsóknum

**Hvat er fiskivinnuroyndir?**
Fiskivinnuroyndir er ein játtan hjá Fiskimálaráðnum, sum stuðlar undir granskíng og menning innan fiskivinnuna.

Fiskimálaráðið hevur gjørt av, at umsóknir til verkætlanir innan fylgjandi øki hava fyrimun:

- Fiskiskapur við ábyrgd
- Gagnnýtsla av øllum
- Sjómatartrygd og nøgdsemi brúkarans
- Virðisøking av upsatilfeinginum
- Búskaparlig og samfelagslig menning av fiskivinnuni
- Heilsa, Trygd og Umhvørvi

**Hvør kann søkja?**
Fyritøkur, almennir stovnar og einstaklingar kunnu søkja um stuðul úr Fiskivinnuroyndum.

Um tørvur er á at orða hugskot til ítøkiligar verkætlanir ber til at seta seg í samband við samskiparan um hetta.

Umsóknir skulu verða Fiskimálaráðnum í hendi í seinasta lagi mánadagin 10. november kl 16.00. Sí adressu niðanfyri.

**Meira fæst at vita:**
Programm, umsóknarbløð og vegleiðing fæst frá á heimasíðuni hjá Fiskimálaráðnum www.fisk.fo. Og Vinnuhúsinum www.industry.fo. Áhugaði eru eisini vælkomin at venda sær til Ásmund Guðjónsson, samskipara, við møguligum spurningum og øðrum.

Ásmundur Guðjónsson, samskipari
Fiskimálaráðið
Yviri við Strond 17-19
Postboks 347
110 Tórshavn

tel: 353030
fartel. 228001
faks: 353035
t-postur: asmundurg@fisk.fo






## Tvøroyrar kvøldskúli veturin 2003/2004

**Tvøroyrar Kvøld- og Ungdómsskúli bjóðar í vetur hesi skeið fram:**

**Frítíðarundirvísing**

| Lærugrein | | Tilmelding hjá | tlf. |
|---|---|---|---|
| **Hondarbeiði** | | Judith Holm | 371168 |
| **Seyming** | | Anna Mortensen | 372810 |
| **Veving** | | Óluva Joensen<br>Kirsten Danielsen | 371001<br>371934 |
| **Máling/tekning** | | Palle Julsgart | 371699 ella 371976 |
| **Matgerð (Klænkikostur)** | | Tina Midjord | 371962 |
| **Fyrstahjálp** | | Naja Mortensen | 371567 |
| **Tónleikur:** | Hornblástur | Jens Knudsen<br>Tróndur Enni | 223053<br>256699 |
| | Kórsangur (gospel) | Jens Knudsen | 223053 |
| | Tónleikur fyri kór og urgu í Tvøroyar kirkju (byrjar 22/10 kl. 19.30) | Jens Mortan Mortensen | 375917 |
| **SRC/ROC-VHF-skeið** | | Don Petersen | 218335 |
| **Undirvísing í teld:** | Tekstviðgerð | Heri Thorsteinsson | 371632 |
| **Venjingar í heitum vatni** | Giktasvimjing | Marjun Olsen | 371642 |
| | Venjingar fyri ryggin | Lise Schou | 371133 lokalnr. 155 ella 371582 |

Øll undirvísing er treytað av nóg stórari luttøku og góðkenning av myndugleikunum.
Tilmeldingargjaldið er 100 kr. + 3 kr. fyri undirvísingartíman.

**Tvøroyrar Kvøld- og Ungdómsskúli**
**Tlf. 371582**





www.sosialurin.fo